Ár 2010, hin 19. oktober

134.
08/00135 Val av nevndum – umval til barnaverndarnevndina.

Í sambandi við at Gvøðbjørg Vest hevur sagt seg úr Barnaverndarnevndini, skal nýggjur limur veljast fyri hana, galdandi fyri restina av inniverandi valskeiði, sum endar í 2012.

Býráðsins samtykt: Málið útsett.

135.
10/00238 Fíggjarætlan 2011 – býráðið.

Á felags temafundi 11. oktober 2010 samtyktu Mentanarnevndin, Sosiala Nevnd, Tekniska Nevnd, Byggi- og Býarskipanarnevndin og Heilsu- og Umhvørvisnevndin at mæla til fylgjandi fíggjarkarm fyri uppskotið til fíggjarætlan fyri 2011, sum verður viðgjørt og útgreinað í víðari viðgerðini:

Inntøkur	140.356 tkr.	
Rakstur	90.400 tkr.	49.956 tkr.
Rentur	8.600 tkr.	
Avdráttir	10.200 tkr.	18.800 tkr.
Úrslit		31.156 tkr.
Íløgur:		31.150 tkr.
Avlop		6 tkr.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 11. oktober 2010 undir við Ment-anarnevndini, Sosialu Nevnd, Teknisku Nevnd, Byggi- og Býar-skipanarnevndini og Heilsu- og Umhvørvisnevndini.

Býráðsins samtykt: Tilmælið frá FíN, 13.10.2010, samtykt.

136.
10/00774 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 25x og 25v á Norðoyri – Sp/f Norðhús.

Vísandi til býráðssamtykt 23. mars 2010, har loyvi varð givið til samanlegging av matr. nr. 25x og 25v, søkir Sp/f Norðhús nú um at fáa samlaðu ognina sundurbýtta í 6 íbúðir. Sí skriv frá Teknisku Umsiting, har mælt verður til, at játta sundurbýti við heimild í løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 5. oktober 2010 undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting, dagfest 1. oktober 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

137.
Viðvíkjandi stadionøkinum – samlimál

Uppskot er komið frá býráðsminnilutanum um staðseting av kollegii og Húsarhaldsskúla Føroya, og skapir hetta ein tørv á at heildarviðgera stadionøkið. Í hesum sambandi varð avrátt at taka øll viðkomandi mál við í eina felags viðgerð.
Talan er um hesi mál:
*09/00766, Broytingar av fótbóltsvøllinum, UEFA-krøv,
*10/00301, Grundøki til Húsarhaldsskúla Føroya,
*09/00517 Nýggjur fótbóltsvøllur,
*10/00708, Ynski um rennibreyt, Ítróttafelagið Treysti,
*10/00717 Studentaíbúðir í Klaksvík, og
*10/00805, Svimjihøllin – útbyggingar/lendistørvur.
Endamálið við hesi samlaðu viðgerð er at geva møguleika fyri at viðgera hesi saman sum eina heild, bæði í mun til lendi og til fígging.
Í skrivi frá Mentanardeildini, dagfest 1. oktober 2010, verður lagt upp til eina prinsippiella viðgerð av nevndu málum, herundir eisini hvussu KÍ- og Badmintonhøllin í framtíðini kunnu verða sambygdar, og at ein bólkur í umsitingini saman vi politisku skipanini (eitt nú formenninir í Mentanarnevndini, Byggi- og Býarskipanarnevndini og Teknisku Nevnd) viðgera hesar spurningar út í æsir at leggja fyri aftur.

Mentanarnevndin tekur á fundi 6. oktober 2010 undir við tilmælinum frá umsitingini, dagfest 1. oktober 2010, og at tvey umboð vegna minnilutan verða vald í bólkin.

Byggi- og Býarskipanarnevndin tekur á fundi 4. oktober 2010 undir við tilmælinum, dagfest 1. oktober 2010, og vil hava tvey úr minnilutanum við í bólkin. Arbeiðið skal verða liðugt 1. januar 2011.

Ferðslunevndin tekur á fundi 5. oktober 2010 undir við Byggi- og Býarskipanarnevndini 4. oktober 2010.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 5. oktober 2010 undir við Byggi- og Býarskipanarnevndini 4. oktober 2010.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 13. oktober 2010 undir við Byggi- og Býarskipanarnevndini 4. oktober 2010, Ferðslunevndini 5. oktober 2010, Teknisku Nevnd 5. oktober 2010 og Mentanarnevndini 6. oktober 2010.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt. Jógvan Skorheim, Auðunn Konráðsson, Óli M. Lassen, Eyðgunn J. Samuelsen og Óluva Klettskarð vald í bólkin.